Dávur Juul Magnussen, tónleikari:

# Talent er einki í sjálvum sær



*Dávur Juul Magnussen, tónleikari: – At spæla solo í Danmark Radio Symfoniorkestri, er tað "feitasta" upplivingin, eg higartil havi havt, sigur Dávur og brosar varisliga, bangin fyri at virka reypandi av sínum avvriki.*

**– Tað gevur tær møguleikar, sum onnur ikki fáa, men er samstundis eisini ógvuliga krevjandi. Tú skalt venja nógv hvønn dag, og tað kostar tær bæði blóð, sveitta og tár, men tað er ongantíð keðiligt, sigur 20 ára gamli tónleikarin, sum seinastu 12 árini hevur roynt seg á ymsum tónleikapallum**

*Orð & myndir:*
*Dagny Joensen*
*dagnyj@post.olivant.fo*

Hann spælir í Symfoniorkestrinum í Norðurlandahúsinum, jammar á Cleopatra hvørt mikukvøld, spældi í fjør við Havnar Hornorkestur á Manhattan í New York, bert fyri at nevna nøkur dømi, har 20 ára gamli Dávur Juul Magnussen hevur luttikið við sínum trombon ljóðføri seinastu árini.

Ljóskastarin hevur seinastu tíðina verið settur á tónleikaran, sum var við í sjónvarpssendingini »Spil for livet«, har hann gjørdist millum fýra tey bestu í hesi klassisku tónleikakappingini. Sum rosinan í pylsuendanum spældi hann solo í Danmark Radio Symfoniorkestri, har hann framførdi Concertino fyri trombon hjá Ferdinand David.

– Tað er »feitasta« upplivingin, eg higartil havi havt, sigur Dávur og brosar varisliga, bangin fyri at virka reypandi av sínum avvriki.

Í næstum fer hann til Danmarkar til upptøkuroynd í Orkester Norden, sum er symfoniorkestur fyri 15 til 26 ára gamlar klassiskar tónleikarar.

Verður hann góðtikin, skal hann saman við Orkester Norden venja í Svøríki, áðrenn farið verður á konsertferð í Suðureuropa í summar. Tað eru eisini aðrir tónleikarar, sum saman við Dávi fara til upptøkuroynd í Orkester Norden í hesi viku. Tey eru Tróndur Herason Olsen, Niklas Mouritsen og Mia Káradóttir.

Til heystar gongur leiðin til Glasgow í Skotlandi, har hann var til upptøkuroynd á hægri lærustovni fyri musikk- og drama í heystfrítíðini í fjør. Fýra tey komandi árini skal hann útbúgva seg har við trombon sum høvuðslærugrein.

### Øðrvísi »Reality-show«

Tá Danmarks Radio í fjør skipaði fyri klassiskari tónleikakapping, vóru tónleikarar, sum áður høvdu